# Dapur ársfrágreiðing hjá arbeiðsgevarafelagnum

**Búskaparkreppan hevði sína stóru ávirkan á árfrágreiðingina hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag á aðalfundinum fríggjadagin**

FRÁGREIÐING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Millum annað stendur í frágreiðingini, at seinasta árið hevur verið avbjóðandi fyri føroyska vinnu. Árið 2008 byrjaði við eini ábending um, at útlitini ikki vóru fult so góð sum undanfarin ár. Ongin væntaði tó, at fíggjarheimurin skuldi renna seg meira ella minni fastan í heyst.

Sonevnda fíggjarkreppan er vorðin búskaparkreppa um allan heim, og merkist hetta eisini í Føroyum. Flestu vinnugreinar merkja, at tað er fall í eftirspurninginum, og at tað er trupult at fáa fígging til nýtt og verandi virksemi. Nógvar fyritøkur hava verið noyddar at tillaga raksturin til broyttu umstøðurnar og hava sum úrslit av hesum sagt fólk úr starvi.



*Báðir, sum stóðu fyri vali hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag vórðu afturvaldir*

Byggivinnan og partar av útflutningsvinnuni eru millum tær, sum eru harðast raktar. Sera stórt virksemi hevur verið í byggivinnuni í fleiri ár, men eftirspurningurin steðgaði nærum upp í byrjanini av 2009.

Útflutningsvinnan er somuleiðis undir trýsti. Hetta tí, at fiskasløgini toskur og hýsa eru fallin mundi í prísi og nøgd, meðan tey bíligari fiskasløgini hava hildið prísin. Somuleiðis eru umstøðurnar fyri útflutning eru vorðnar nógv truplari, tí tað hevur verið sera torført at fáa trygging av keyparum orsakað av fíggjarkreppuni.

### Fiskivinnan illa fyri

Somuleiðis verður stórur dentur lagdur á, at føroyska fiskivinnan sum heild er illa fyri fíggjarliga. At úrslitini seinnu árini hava verið vánalig, og at fiskiskapurin minkaður. Og tí verður spurnartekin sett við skipanina av fiskivinnuni.

Og tí mælir Føroya arbeiðsgevarafelag til, at skipanin fyri føroyska fiskivinnu verður tikin upp til endurmetingar við tí fyri eyga at skipa eina vinnu, sum er lívfrøðiliga burðardygg og búskaparliga haldfør og gangnýtir tilfeingið á ein hátt, sum kastar mest møguligt av sær til bæði vinnuvirkir og samfelagið sum heild.

Frágreiðingin staðfestir somuleiðis, at gongdin í 2008 og higartil í 2009 hevur sett vinnuna undir trýst og kravt stórar tillagingar. Sum sæst í frágreiðingini, væntar felagið eisini, at tillagingar verða framdar innan tað almenna, eins og vinnuni verða veittir so góðir karmar sum gjørligt.

## Nevndin í arbeiðsgevarafelagnum afturvald

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag vórðu Jóhan Páll Joensen og Jón Danielsen afturvaldir, nú teir stóðu fyri afturvali.

Hetta merkir, at nevndin er óbroytt og at Jóhan Páll Joensen, Kristoffur Laksá, Bergur Poulsen, Magni Arge, Jón Danielsen, Meinhard Jacobsen og Jóhanna á Bergi manna hana.

Enn hevur nevndin ikki skipað seg.

